**Viðtøkur hjá Sinnisbata Ung**

**§1 Navn**
Navn felagssins er Sinnisbati Ung, sum styttist SBU

**§2 Endamál**
Sinnisbati Ung er ein ungdómsfelagsskapur, har ung virka fyri at seta sjóneykuna á sálarheilsu og sálarsjúku. Endamálið er at betra um sálarheilsukorini, serliga hjá ungum í Føroyum.
Sinnisbati Ung er eitt sjálvstøðugt ungmannafelag hjá Sinnisbata, ið virkar fyri somu endamálum sum móðurfelagið.

**§3 Limaskapur og limagjald**
Stk.3a: Øll, ið vilja virka fyri áhugamálum felagsins, kunna melda seg í Sinnisbata Ung.

Stk.3b: Limagjaldið er 100 krónur árliga.

Stk.3c: Sum limur í Sinnisbata Ung, er møguligt at vera virkandi limur, hvílandi limur og stuðulslimur.
Virkandi limir eru millum 15 og 30 ár, meðan stuðulslimir kunnu vera eldri ella yngri.

Sum limur í Sinnisbata Ung fært tú samstundis møguleikan at gerast limur í Sinnisbata.

Sum limur í Sinnisbata Ung kann tað koma fyri at privatpersónar deila sínar persónligu ella viðkvomu upplivingar ella upplýsingar. Allir limir felagsins, ið eru á fundum, hava tí fulla tagnarskyldu.
Um fólk, sum eru óheft av felagnum, fáa atgongd til brúkarir á sosialu miðlunum hjá felagnum, skula tey eisini halda hesa tagnarskylduna

**§4 Aðalfundur**
Aðalfundurin er hægsti mynduleiki felagsins. Aðalfundurin verður hildin í fyrra ársfjórðingi á hvørjum ári.
Kallað verður til aðalfund minst eina viku frammanundan. Aðalfundurin skal lýsast í øllum miðlum, ið Sinnisbati Ung nýtir, umframt kunngerast í teldubrævi til limirnar.
Uppskot til aðalfundin skulu verða nevndini í hendi tríggar dagar áðrenn aðalfundin. Undantak kann takast, um allir limir eru samdir um at ein, ið ikki hevur sagt frá, kann leggja eitt uppskot fram.
Aðalfundurin viðger hesi mál:

- Val av orðstýrara
- Ársfrágreiðing frá forfólkinum
- Grannskoðaðan roknskap fyri seinasta rakstrarár felagsins

- Møguligar lógarbroytingar
- Innkomin mál
- Limagjald fyri komandi ár
- Nevndarval
- Ymiskt

Einans limir, ið ikki eru í eftirstøðu við limagjaldi hava atkvøðurætt. Einans limir, ið ikki eru í eftirstøðu við limagjaldi kunnu stilla upp til nevndina. Limir, ið ynskja at stilla upp til nevndina, men ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, kunnu boða nevndini frá uppstilling.
Á aðalfundi verða øll mál avgjørd við meiriluta.

Eykaaðalfundur verður hildin um fimm ella fleiri limir halda tað vera neyðugt. Eykaðalfundurin verður lýstur á sama stað sum limatiltøkini verða, og í teldubrævi til allir limir felagsins.

**§5 Fyrisiting**
Nevndin í Sinnisbata Ung verður mannað av trimum limum, og nevndin skipar seg sjálv við forfólki, kassameistara og skrivara, ið tekna felagið. Nevndarlimirnir verða valdir á aðalfundi og hava ábyrgd av dagligu umsitingini í felagnum og samskifti við samstarvsfeløgum, Sinnisbata, miðlar o.ø. Avgerðir og annað verða tiknar felags í ungmannafelagnum millum virknu limirnar.

Nevndin er ein trímannanevnd, ið sær soleiðis út:

- **Forfólk:** Forfólkið virkar sum ábyrgdarfólk hjá felagnum, og hevur millum annað ábyrd av lyklunum til hølið og at gera ársfrágreiðing til næsta aðalfund. Harumframt annað fyrifallandi sum skuldi komið fyri. Forfólkið hevur ábygrd av at kalla inn til árliga aðalfundin.
- **Kassameistari:** Hevur millum annað ábygrd av, at móttaka kvittanir og at halda skil á, at pengarnir vera nýttir skilvíst. Harumframt skal viðkomandi leggja rokniskapin fram til aðalfundin.
- **Skrivari:** Hevur millum annað ábyrgd av teldupostinum og at skriva fundarfrásøgnina til aðalfundin.

Minst ein nevndarlimur skal vera undir 30 ár.

Atkvøðukassar verða brúktir til at taka avgerðir við, um ikki annað verður samtykt. Er meirluti fyri, verður uppskotið samtykt. Allir virknir limir kunna leggja fram uppskot. Uppstanda ósemjur innanhýsis í felaginum í málum, sum skulu avgreiðast, kann atkvøðast millum limirnar, har meirluti skal vera fyri, at eitt mál kann góðkennast.

**§6 Avtøka av felagnum**

Um felagið ynskist avtikið, kann hetta fara fram á aðalfundi ella eykaaðalfundi, og skulu tveir triðingar av uppmøttum limum atkvøða fyri hesum á fylgjandi aðalfundinum. Avgerð um ognir felagsins verður tikin samstundis

Soleiðis er samtykt á aðalfundi í mars í 2023.